tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Vánaligt handalag

*Oddagrein*

Nú hevur fólkaskúlin ligið lamin í meiri enn 14 dagar, men enn røkist einki fyri semju, hóast tað ígjár frættist, at semingssmenninir hava samband við partarnar, sum jú standa langt frá hvørjum øðrum.

Hvørjar avleiðingar arbeiðssteðgurin fær fyri teir eldru næmingarnar er ikki greitt fyri okkum, sum eru uttan fyri skúlan, men tað er greitt, at arbeiðssteðgurin elvir til hurlivasa og ótryggleika í bæði skúla og heima.

Tað er tí ikki løgið, at skúlaleiðarar í Eysturoynni og skúlastjórar í Havn, sum óivað hava størstu trupulleikarnar, heita á landsstýrismannin í skúlamálum um at taka stig til at loysa trætuna.

Heldur ikki er løgið, at bæði skúlafólk og onnur við í hesum døgum spyrja: -hvar er Signar á Brúnni. Hann hevur ovastu ábyrgdina í skúlamálum, men hevur verið óvanliga tigandi í fyrsta læraraverkfallinum nakrantíð.

Spurningurin er jú ikki bara um eitt lønarmál, tí sjálvandi skulu lærarar hava ta lønarhækking, sum øll onnur fingu síðsta ár, men spurningurin er jú um nýggju fólkaskúlalógina og hvat hon kostar í pengum og tí eisini í lærarartali.

Fólkaskúllálógin er samtykt, men tað skilst, at kostnaðurin veldst alt um, hvussu nógvar kunngerðir verða settar í verk ella ikki. Og tað merkir: hvønn politikk hevur landsstýrismaðurin sett sær fyri at reka á hesum øki.

Ætlar hann av álvara at fáa fólkaskúlalógina at virka, má hann greiða landsstýrismanninum í fíggjarmálum frá, at hetta kostar so og so nógvan pening, og so má Karsten Hansen gera eina eykajáttanarlóg.

Sjálvandi skal hann ikki oysa út, men tað ber heldur ikki til at samtykkja lógir, og so ikki játta tann pening, sum lógin krevur. Skúlin hevur fyrireikað seg til nýggju lógina, og tað skilst, at bæði lærarar og næmingar dáma væl teir nýggju møguleikarnar og avbjóðingarnar.

Ígjár gjørdu bæði lærarar og næmingar vart við støðuna, men hvussu leingi fara landsins politikkarar - tað veri seg løgmaður, samgonga og andstøða - at góðtaka tað út av lagi vánaliga handalag, sum er sýnt í hesum máli?

*Sosialurin*



# Smyril Line leigað farmaskip

*140 metra langa farmaskipið lastar 86 trailarum*

EIRIKUR LINDENSKOV

Smyril Line hevur aftur leigað farmaskip at flyta farmin, nú Norröna fer undir summarsiglingina, ið byrjar 13. mai.

Talan er um annað av tveimum systurskipum, MF Bolero og MF Tango. Skipini eru 140 metrar til longdar, 21 metur breið og sigla 17 míl. Lastiorkan er 86 trailarar.

Skipini eru bygd í 1985 og klassað í Gemanischer Lloyd og sigla undir rumenskum flaggi.

Seinast skipini hava siglt í Norðsjónum, hevur tað verið fyri áv´ ikavist Mærsk og Tor Line

# Føroya skjótasta bygd 25 sekund



Longri tekur tað ikki at koyra ígjøgnum hana, heldur teg til mest loyvdu ferð. Tey flestu – ið hvussu so er nógv fremmandafólk - uppdaga hana slett ikki, tá ið tey strúka framvið.Summi hava kanska ongantíð hoyrt navnið.

Undir Gøtueið eitur hon. Sambært gula vegskeltinum. Bara Gøtueið, sambært føroyska landakortinum, listanum yvir postøki og telefonbókini. Sjálvi kalla tey bygdina undir Gøtueið, ella undir Eiðinum.

So stutt er millum Gøtueið og grannabygdina, Skipanes, at tey undir Gøtueið so at siga kunnu standa í túninum og spýta yvir í grannakommununa. Ella sum ein av bygdarmonnunum málber seg:

- Eg kann míga úr havanum yvir í Runavíkar kommunu.

Gøtueið hoyrir nevniliga til Gøtu kommunu, meðan Skipanes hoyrir til Rúnavíkar kommunu.Markið er Eiðisá.

Tey umleið 30 fólkini undir Eiðinum rópa seg gøtumenn. Tey flestu halda við GÍ, meðan grannarnir rópa á NSÍ. Skúlabørnini ganga í skúla í Gøtu og í Fuglafirði, meðan
tey á Skipanesi ganga í skúla við Skálafjørðin. Gøtueið hevur bert 13 telefonfelagar afturímóti 47 í grannabygdini sunnafyri ánna. Og meðan felagarnir á Skipanesi hava alskyns eftirnøvn líka frá Konoy, Østerø, Skibenæs og Skipanes, ja so er tað meira einfalt undir Gøtueið. Har eita felagarnir antin Joensen ella Poulsen.

Hóast hetta er grannalagið millum tey undir Gøtueið og Skipanes gott. Tey skipa fyri felags tiltøkum, og rósa sær millum annað av, at hava átt føroya størsta nýggjársbál.

Kanska tú kveitir upp næstu ferð, tú strýkur framvið Føroya skjótastu bygd...

Í sambandi við lesarabrævið hjá Jens Christiani Carlsson, sum var í blaðnum í gjár, skal viðmerkjast, at brævið eisini sent Informatión og Berlingske Tidende - tí var tað skrivað á donskum

*blaðstj*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið kæri maður, pápi og abbi okkara

**HANS Í BEITI**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til gravar. Tøkk fyri blómur, kransar, brøv og uppringingar og til tykkum øll, sum hjálptu til á mangan og ymiskan hátt.

Eisini ein tøkk fyri peningagávurnar til »Zarepta«.

**Lena, Ólavur og Katrin**

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**



# Signar má frá í stundini

*Sambært Bjørn á Heygum vísir kanningin hjá løgtingsgrannskoðarunum heilt greitt, at Signar á Brúnni Breyt landsins lógir, tá hann uttan loyvi játtaði pening til sjónvarpið*



*Frágreiðingin hjá løgtingsgrannskoðarunum vísir, at Signar á Brúnni, landsstýrismaður, hevur brotið landsins lógir*

JOHN JOHANNESSEN

– Heilt greið prógv eru fyri, at Signar á Brúnni hevur brotið landsins lógir, sum hann sjálvur umsitur. Tí má hann fara frá í stundini, skal Føroya fólk hava álit á rættartrygdini í landinum.

Hetta eru greiðu boðini frá Bjørn á Heygum, advokati, ið sjálvur hevur verið við til at gjørt stýrisskipanarlóg landsins.

Bjørn á Heygum sigur seg hava lisið frágreiðingina hjá løgtingsgrannskoðarunum gjølla, og er hann ikki í iva um niðurstøðuna.

Frágreiðingin staðfestir eftir hansara tykki heilt greitt, at Signar á Brúnni ikki spurdi seg fyri hjá løgtinginum og gjørdi beint móti ráðum frá løgtingsins fíggjarnevnd, tá hann játtaði sjónvarpinum pening uttan um fíggjarlógina tann 23. juni 1999.

### Fýra møguleikar

Bjørn á Heygum sigur, at landsstýrismaðurin við hesum atburði háar lógirnar fyri sítt egna land. Og háðanin gerst upp aftur størri, tá talan er um ein landsstýrismann, ið sjálvur skal umsita landsins lógir.

– Tað, sum vit í veruleikanum tosa um, er at maðurin, ið skal umsita lógirnar, er tann fyrsti at bróta tær, vísir advokaturin á.

Somuleiðis vísir Bjørn á Heygum á, at einki land í heiminum kann liva við, at ein ráðharri brýtur landsins grunleggjandi lógir, eins og Signar hevur gjørt. Tí má maðurin kenna sína vitjunartíð og fara frá í stundini, skal rættartrygdin tryggjast.

Men fer Signar á Brúnni ikki frá av sínum eintingum, eru sambært advokatinum tríggir aðrir møguleikar at taka til.

Tann fyrsti av hesum møguleikunum er, at Tjóðveldisflokkurin, har landsstýrismaðurin er limur, tekur stig til at fáa mannin frá. Hetta heldur Bjørn á Heygum, at flokkurin má gera, skal hann varðveita tað álit, fólk hava á honum.

Tekur Tjóðveldisflokkurin ikki stig til at fáa Signar á Brúnni frá sum landsstýrismann, má løgmaður seta landsstýrismannin frá.

Men tekur løgmaður heldur einki neyðug stig, heldur advokaturin, at løgtingið má taka um endan og leggja misálit á landsstýrismannin.

### Eingin ivi

Meðan hendan samgongan hevur sitið, er tað fleiri ferðir hent, at ivi hevur tikið seg upp, um landsstýrisfólk hava brotið lógina. Seinast var tá Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, segði sjúkrahúsleiðaranum, Jákupi Mørkøre, úr starvi.

Men Bjørn á Heygum vísir á, at øll hesi dømi hava verið ivamál. Tað heldur hann ikki vera galdandi nú.

– Hjá Signari á Brúnni er einki ivamál. Frágreiðingin hjá landsgrannskoðaranum vísir heilt greitt, at landsstýrismaðurin hevur forbrotið seg, staðfestir advokaturin.

Tað hevur ikki eydnast Sosialinum at fáa viðmerkingar frá Tjóðveldisflokkinum um málið. Men Høgni Hoydal, sum hevur verið uttanlands og tískil ikki havt stundir at sett seg inn í frágreiðingina, vissar um, at málið fer at verða viðgjørt.

# Nýtt modell fyri stjórnina

*Landsstýrið fer at leggja nýtt modell um skiftistíð fyri donsku stjórnina. Talan er um eitt modell við kapitalisering ella jøvnum niðurskurði í blokkstuðulinum yvir eitt fast áramál*

JOHN JOHANNESSEN

Landsstýrið ásannar, at uppskotið, tað legði fyri donsku stjórnina um fíggarliga skiftisskipan er miseydnað.

Roknað varð við, at føroyska andstøðan og somuleiðis danska stjórnin fóru at taka undir við modelli landsstýrissins, men so varð ikki. Uppskotið fekk krakk frá báðum pørtum, hóast landstýrið vísir á, at tað byggir á hugskot frá Javnaðarflokkinum.

Men mótið hjá landstýrinum er kortini ikki uppi. Tað sigur seg hava fleiri modell um búkaparliga skiftistíð liggjandi í skjáttuni klár at leggja á samráðingarborðið fyri donsku stjórnini.

Eitt av uppskotum landstýrisins byggir á, at blokkstuðulin skal burtur innan eitt ávíst áramál, og skal hetta henda antin við einari kapitalisering ella við einari javnari niðurgongd í stuðulinum fyri hvørt ár í hesum tíðarskeiði.

Høgni Hoydal váttar fyri Sosialinum, at hetta uppskot helst fer at verða lagt á samráðingarborðið á næsta samráðingarfundinum, ið verður hildin fyrst í mei mánaði.

Varaløgmaður heldur, at væl skuldi borið til at fingið danir at tikið undir við slíkum uppskoti, men um talan verður um kapitalisering av blokkinum ella javna niðurgongd, veit hann ikki at siga.

Hetta, heldur hann, hongur saman við, um Danmark vil rinda Føroyum nógvan pening ávís stutt tíðarskeið, ella um Danmark heldur vil rinda peningin meira javnt.

Sum skilst á andstøðuni, tekur hon heldur ikki undir við hesum uppskotinum. Formaður Sambandsflokssins, Edmund Joensen, gjørdi í Krosskasti í Sjónvarpi Føroya mikukvøldið heilt greitt, at hann ikki vil tosa um hetta málið.

Formaður Javnaðarflokssins, Jóannes Eidesgaard, hevur nøkulunda somu hugsan. Hann heldur, at blokkstuðulin sjálvsagt skal burtur, tá Føroyar eru klárar at liva uttan hann. Men Jóannes Eidesgaard heldur tað vera mannminkandi at fara til Danmarkar at fáa skuldina til statin strikaða og krevja langa skiftistíð.

Um nýggja modellið hjá landsstýrinum ljóðar skilagott, vil formaður Javnaðarfloksins ikki gera viðmerkingar til. Hann vísir á, at Javnaðarflokkurin ikki er samdur í høvuðsætlan landstýrisins um at skipa Føroyar sum fullveldi, og tí leggur hann ikki í at vera samdur við landsstýrið um smálutir í sáttmálauppskotinum.

– Tá vit ikki kunnu taka undir við høvuðsendamálinum í sáttmálauppskotinum, kunnu vit heldur ikki taka undir við brotum í tí, sigur Jóannes Eidesgaard.



TRANSIT®
PAR-SUCH

Sosialurin - 311820

**NÓGV NÝTT HEIMKOMIÐ**

**Toppar - Blusur**
**Niðurdeilar - Kjólar**
**Buksur - jakkar**

**GEVIÐ GÆTUR!**
**Seinasta kollektiónin:**
**VEITSLUKOLLEKTIÓNIN verður nú seld til**
**BOTNPRÍSIR**

**KJÓLAR**
Fyrr 2.498,- 1.398,-
**NÚ 999,- 599,-**

**Silkijakkar**
Fyrr 3.198,- 2.298,-
**NÚ 1.299,- 899,-**

**29** Í Tróndargøtu
tel. 31 82 00
ella 21 81 99